*Dagf. 24. juni 2019*
*HIMR. J. nr. 19/00542-6*

***Sirið Stenberg***
***landsstýriskvinna***

***Svar***

***upp á***

**fyrispurning nr. 68/2018 eftir § 52a í tingskipanini um bíðitíðir í føroyska sjúkrahúsverkinum frá Jenis av Rana, løgtingsmanni**

**Spurningurin var soljóðandi:**

1. Landsstýrismaðurin verður biðin um at útgreina fyri Løgtinginum bíðitíðir í føroyska sjúkrahúsverkinum, og hvussu hesar eru, samanbornar við bíðitíðir í Danmark.
2. Ynsktar verða m.a. uppgerðir yvir bíðitíðir á:

- Ortopediska økinum
- Reumatologiska økinum
- Psykiatriska økinum
- Maga/tarm økinum
- Urologiska økinum
- Gynækologiska (kvinnusjúku) økinum
- Neurologiska økinum
- Eygna økinum

Hugsað verður um tíðina, frá at sjúklingurin verður ávístur frá kommunulækna, til hann verður móttikin á deild á sjúkrahúsinum ella hjá serlækna, og evt. viðgerð er byrjað.

**Svar:**

**Til spurning 1 og 2**

Sjúkrahúsverk Føroya hevur kannað, hvat bíðitíðirnar vóru til ymisku serlæknaøkini í 2018. Hetta merkir, at yvirlitið niðanfyri er ikki ein løtumynd, men byggir á søgulig tøl. Bíðitíðirnar skulu takast við ávísum fyrivarni, tí stundir hava ikki verið til endaliga at validera tølini. Mett verður tó, at tølini fyri bíðitíðirnar eru á einari leið og geva eina ábending um, hvussu støðan yvirskipað er viðvíkjandi bíðitíðum á ymsu økjunum.

Landssjúkrahúsið hevur tó gjørt vart við, at óvissan um tølini fyri eygnaøkið er somikið stór, at tey hava valt ikki at taka tey við í svarinum í hesi syftu.

Tá tað viðvíkur bíðitíðir í sjúkrahúsverkinum hevur tað týdning at staðfesta beinanvegin, at er talan um tilburð ella sjúku, sum verður mett at verða álvarsamt og bráðfeingis, verður kanningin/viðgerðin framd beinanvegin. Tí eru bíðitíðir tengdar at, um viðgerðin er akutt,

subakutt ella talan er um eina viðgerð, sum er minni álvarsom og kann bíða. Hetta byggir altíð á eina læknafakliga meting.

Tað skal viðmerkjast, at samanteljingin í talvunum niðanfyri í summum førum ikki gevur neyvt 100 prosent. Hetta kemst av at desimaltølini eru avrundaði.

***Ortopediska økið***




**MYND 1**

Myndin omanfyri vísir, at 27 prosent av sjúklingunum bíðaðu millum 0 og 30 dagar, frá tí at sjúklingurin fekk ávísing frá kommunulækna, til sjúklingurin kom á sjúkrahúsið í sambandi við hesa ávísing. Talan er vanliga um eina forkanning ella eftirkanning hjá serlækna á sjúkrahúsinum.

17 prosent av sjúklingunum bíðaðu millum 31 og 60 dagar, 10 prosent bíðaðu millum 61 og 90 dagar, 24 prosent bíðaðu millum 91 og 180 dagar, og hjá 21 prosentum av sjúklingunum var bíðitíðin longri enn 180 dagar.

***Reumatologiska økið***




**MYND 2**

Á reumatologiska økinum eru bíðitíðirnar sum víst omanfyri á mynd 2. Yvirskipað kann sigast, at fjórðingurin av sjúklingunum bíða upp til tríggjar mánaðir, annar fjórðingurin bíðar millum tríggjar og seks mánaðir, meðan helvtin av sjúklingunum bíða longri enn seks mánaðir, frá tí tey verða ávíst, til tey koma á sjúkrahúsið. Vanliga er talan um viðtalu á Reumatologiska ambulatoriinum. Eftir at ein giktalækni hevði virkað í longri tíð á Landssjúkrahúsinum, varð ein settur afturat við ársenda í 2017, soleiðis at tað í dag eru tveir giktalæknar.

Hvørki landsstýriskvinnan ella Landssjúkrahúsið meta, at hetta er nøktandi, og tí verða hesi viðurskifti kannað nærri til tess at finna útav, hvat skal gerast fyri at stytta um bíðitíðirnar.

### *Psykiatriskaøkið*




**MYND 3**

Mynd 3 vísir bíðitíðirnar á psykiatriska økinum. Samanumtikið kann sigast, at bíðitíðin hjá 77 prosentum av sjúklingunum er styttri enn tveir mánaðir - 53 prosent bíða millum 0 og 30 dagar og 24 prosent millum 31 og 60 dagar. Hjá 12 prosentum er bíðitíðin millum 61 og 90 dagar. 11 prosent av sjúklingunum bíða longri enn 180 dagar frá ávísing, til tey koma á sjúkrahúsið til eina forsamrøðu, viðtalu ella annað.

### *Maga/tarm-økið (endoskopiir)*




**MYND 4**

Tá ið tað kemur til maga/tarm-økið, eru bíðitíðirnar sum lýstar á mynd 4 omanfyri. Góður helmingurin bíðar styttri enn 60 dagar og hin helmingurin longri enn 60 dagar. Fjórðingurin av sjúklingunum bíða 91 dagar ella longri.

### *Urologiska økið*




**MYND 5**

Á urologiska økinum eru bíðitíðirnar sum vístar á mynd 5 omanfyri. 36 prosent bíða millum 0 og 30 dagar, 29 prosent av sjúklingunum bíða millum 31 og 60 dagar og 13 prosent bíða millum

61 og 90 dagar. Innan urologiska økið vísa tølini, at 18 prosent av sjúklingunum bíða millum tríggjar og seks mánaðir og 4 prosent bíða longri enn 180 dagar.

### *Gynækologiska økið*




**MYND 6**

**MYND 6**

Á gynækologiska økinum eru bíðitíðirnar sum vístar á mynd 6 omanfyri. Hjá góðum helmingi eru bíðitíðirnar styttri enn ein mánað, onnur 20 prosent bíða millum ein og tríggjar mánaðir, 4 prosent bíða millum tríggjar og seks mánaðir, meðan 25 prosent bíða í 180 dagar ella longri. Viðmerkjast skal, at Landssjúkrahúsið í løtuni hevur sera ilt við at manna serlæknastørvini í kvinnusjúkum í 2018.

### *Neurologiska økið*




**MYND 7**

Bíðitíðirnar á neurologiska økinum eru lýstar á mynd 7 omanfyri. Á hesum økinum bíða 10 prosent styttri enn 30 dagar, 11 prosent millum 31 og 60 dagar og 13 prosent millum 61 og 90 dagar. 26 prosent bíða millum tríggjar og seks mánaðir, meðan 39 prosent bíða longri enn seks mánaðir.

Í svari uppá fyrispurning frá tingmanninum í vár greiddi landsstýriskvinnan frá, at bíðitíðin til útgreinan av nervafrøðiligum sjúkum lá millum 18-24 mánaðir í 2015, man var komin niður á 10 mánaðir. Arbeitt verður framhaldandi við at fáa minkað enn meira um bíðitíðina.

Í Danmark verða bíðitíðirnar fyri viðgerðir á teimum ymisku sjúkrahúsunum kunngjørdar á "mitsygehusvalg.dk", har tað er møguligt at leita eftir eini ávísari viðgerð og fáa upplýst bíðitíðina á teimum ymisku sjúkrahúsunum í regiónunum. Har verður bert ein bíðitíð upplýst

fyri ta einstøku viðgerðina, tí er tað trupult ella ómøguligt at samanbera hesar við tær bíðitíðir sum eru upplýstar omanfyri.

Tað er vert at nevna, at tað í Danmark er ásett ein viðgerðartrygd í lóg, sum frá 1. oktober 2016 hevur verið 30 dagar. Í stuttum merkir hetta, at bíðtíðin í mesta lagi skal verða 30 dagar til útgreining og 30 dagar til viðgerð. Er talan um krabbamein ella ávísar hjartasjúkur, er bíðitíðin til útgreining í mesta lagi 14 dagar og 14 dagar til viðgerð.

Tá viðvíkur bíðitíðir í Føroyum, er vert at nevna, at tað í løtuni situr ein tvørfakligur bólkur og viðgerð, hvussu ein skipan við viðgerðartrygd kann verða sett í verk í føroyska sjúkrahúsverkinum. Tilmæli hesum viðvíkjandi verður latið landsstýriskvinnuni í næstum, soleiðis at fyrireikingararbeiðið við at seta eina tílíka skipan í verk kann byrja.

Eisini hevur tað støðugt verið arbeitt við at skipa eina felags visitasjón og felags bíðilistar. Fyri at fáa hetta sett í verk hevur verið neyðugt, at ávísar fortreytir skulu verða komnar uppá pláss. Hetta arbeiðið er við at koma upp á pláss soleiðis at tað verður skapt grundarlag fyri at skipa felags visitasjón og felags bíðilistar – eitt arbeiðið, sum landsstýriskvinnan raðfestir høgt.

Heilsu- og innlendismálaráðið, 24. juni 2019

**Sirið Stenberg**
landsstýriskvinna